# Víkingur fekk hevnd

**Við einasta máli í dystinum í gjár fekk Víkingur hevnt, at ÍF fyri hálvumtriðja mánaði síðani fór avstað við plássinum í steypafinaluni, sum grannarnir tá kappaðust um. Nú andar Víkingur av álvara ÍF í nakkan**


SØT HEVND

*Hóast ÍF hevði nógvar atsóknir í seinna hálvleiki, so Geza Turi viðhvørt hevði ivaleyst at gera í málinum hjá Víkingi, eydnaðist teimum ljósabláu at hevna avrættingina í steypakappingini*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir*

**Hilmar Jan Hansen**

Tað var eitt gott álop 18 minuttir inn í fyrra hálvleik, ið avgjørdi dystin í Fløtugerði í Fuglafirði í gjár, tá ÍF tók ímóti grannunum í Víkingi. Bárður Hansen, sum hevði verið raskur í høgru síðu, sletti bóltin aftur um seg til Sverra Jacobsen, ið beinanvegin legði innfyri, har Páll Klettskarð var hægstur og skallaði ímóti málinum. Jákup Mikkelsen tveitti seg niður, men bara fekk hálvbjargað, og so lá væl fyri hjá Sølva Vatnhamar at avgreiða returin og leggja gestirnar á odda 1-0.

Einki var at siga til, at Víkingur kom á odda, tí tað hevði í eina løtu ligið í luftini, at liðið kundi fáa eitt mál. Bóltar komu innfyri úr báðum síðum og hóast menn bjóðaðu seg til, var bara eingin teirra nóg avgjørdur ella rakk ikki bóltinum í røttu løtuni.

Og við hesum eina málinum má sigast, at Víkingur hevnd fyri, at ÍF í juni í seinnu hálvfinaluni sendi Víking úr kappingini um steypakappingini – bara ein dyst frá sjálvari finaluni!

## Mál kolldømt

ÍF hevði eisini onkrar royndir í fyrra hálvleiki, men annaðhvørt bóru tær ikki boð í bý ella kom onkur av teimum ljósabláu fyri. Spælið hjá vertunum hekk heldur ikki líka væl saman sum hjá teimum í Víkingi, ið tóktust finna hvønnannan væl, samstundis sum tað sá út til at vera meira ætlan yvir spælinum hjá teimum, meðan tað hjá ÍF var meira tilvildarligt.

Víkingur hevði enntá bóltin í málinum eina ferð aftrat í fyrra hálvleiki, men tað var kolldømt brádliga ein enn størri kjans at avgera dystin eina ferð fyri allar, men Sølvi Vatnhamar megnaði inni í fimmmetrinum hjá ÍF at skjóta bóltin uppum...

Eftir steðgin vendi alt hinvegin. Nú var tað ÍF, ið megnaði at leggja trýst á, samstundis sum spælið í løtum koyrdi sera væl. Víkingur fekk mestsum einki at rigga, og út frá teimum mongu royndunum, fuglfirðingar høvdu, áttu teir undir vanligum umstøðum at fingið bæði eitt og tvey mál. Men kanska lýsti vantandi effektiviteturin støðuna hjá ÍF í løtuni, tí liðið einki burtur úr sínum møguleikum.

Mitt í rúgvuni av ÍF-atsóknum í seinna hálvleiki fekk Víkingur brádliga ein enn størri kjans at avgera dystin eina ferð fyri allar, men Sølvi Vatnhamar megnaði inni í fimmmetrinum hjá ÍF at skjóta bóltin uppum...

## Misjavnar formkurvar

ÍF og Víkingur kappast um at vinna sær pláss millum fýra tey fremstu, og hóast ÍF er har nú, hevur liðið bæði eitt stig og ein dyst meira enn Víkingur, ið skjótt kann fara framum. Ikki kann heldur sigast, at fuglfirðingar síggja alt ov gott út í løtuni, tí ósigurin í grannauppgerðini í gjár var tann triði á rað, og ÍF hevur veruliga brúk fyri at koma aftur á slóðina.

Hinvegin hevur Víkingur ikki tapt í sínum síðstu fimm dystum, og tí peikar formkurvan hjá gøtumonnum og leirvíkingum meira uppeftir, heldur enn nakað annað. Hóast Víkingur ikki var serliga sannførandi eftir steðgin í gjár, eydnaðist tó at halda vertunum frá at skora, so tí kundi sæð út til, at Víkingur aftur nærkast eini javnvág, ið kann geva fleiri stig í posan næstu dystirnar.

*einslistir@kallnet.fo*

# Fara eftir tí sama

**Hilmar Jan Hansen**

Við avgerandi málinum í Fuglafirði í gjár staðfesti Sølvi Vatnhamar støðu sína sum toppskjútti hjá Víkingi, og við sínum 10 málum higartil er hann eisini framvegis næstfremstur av øllum málskjúttunum í Vodafonedeildini.

– Tað er sjálvandi deiligt at skora málini, men tað týdningarmesta er at fáa stigini. Hesa ferð var ætlanin hjá okkum heilt avgjørt at fáa øll trý stigini, tí vit høvdu nógv at hevna, eftir at ÍF sendi okkum út úr steypakappingini. Vit vildu vísa, hvør dugur var í okkum, og tað gjørdu vit eisini, sjálvt um vit góvu teimum ov nógv pláss í seinna hálvleiki, segði Sølvi eftir dystin.

– Fyrra hálva av kappingini var skuffandi, men nú royna vit at koma so høgt, sum tað ber til hjá okkum. Málið er fyrst og fremst at taka fjórða plássið, so vit næsta ár kunnu spæla Europa League, og tí royna vit nú at sleppa fram um ÍF, sum hevur eitt stig meira enn vit, men eisini hevur spælt ein dyst meira.

## Marginalar ímóti

Stendur tað til fuglfirðingar, skal hetta tó ikki eydnast Víkingi, tí málið hjá ÍF er júst tað sama, at fáa atgongd til europeiskan fótbólt næsta ár.

– Víkingur andar okkum í nakkan, men vit royna at koma víðari, so vit í minsta lagi kunnu fáa fjórða plássið. Vit mugu ásanna, at vit eru steðgaðir eitt sindur upp, men soleiðis er tað bara, at tú tú fært ein niðurtúr viðhvørt. Tað er støðan hjá okkum nú, men vit fara framvegis at gera alt fyri at venda gongdini, segði Andy Olsen hjá ÍF.

– Heldur ikki hesa ferð vóru marginalarnir við okkum, tá vit í seinna hálvleiki komu longur fram á vøllin, samstundis sum Víkingur trekti seg longur aftur. Vit fingu nakrar møguleikar, men fyri tað mesta var talan um hálvar kjansir, sum vit tíverri einki fingu burturúr. Vóru vit hepnari í dag, fingu vit okkurt mál, men marginalarnir eru bara ikki við okkum í løtuni.